# ÁRSFRÁSØGN 2007

NORÐOYA SPARIKASSI

ÁRSFRÁSØGN 2007

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Leirvík
Kulibakki 11
FO-520 Leirvík
Tel. 475100
Fax 476010

Deildin í Saltangará
Heiðavegur 21
FO-600 Saltangará
Tel. 475000
Fax 476012

Deildin í Tórshavn
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

# UM SPARIKASSAN

### Sparikassin

er sjálveigandi stovnur. Hvørki stovnarar ella onnur eru ánarar av peningaogn ella avlopi sparikassans.

### Avlop sparikassans

verður - burtursæð frá tí, sum verður nýtt til vælgerandi og almenngagnlig endamál – lagt afturat eginpeningi sparikassans, alt til tryggjan av sparipeninginum.

### Í sparikassanum

eru tygum altíð vælkomin, og starvsfólkið her er til reiðar at geva tygum leiðbeiningar og upplýsingar í fíggjarspurningum.

# INNIHALDSYVIRLIT

| | |
|---|---|
| Lykla- og høvuðstøl | 7 |
| Ársfrágreiðing | 8 |
| Átekningar til ársfrásøgnina | 10 |
| Átekningar frá óheftum grannskoðara | 11 |
| Rakstrarroknskapur | 12 |
| Fíggjarstøða 31. desember | 13 |
| Kapitalflytingar og solvensuppgerð | 14 |
| Peningastreymsroknskapur | 15 |
| Viðmerkingar | 16 |
| Nýttur roknskaparháttur | 22 |

# LYKLA- OG HØVUÐSTØL

| Lyklatøl | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 29,2 | 29,6 | 25,5 | 19,0 | 17,5 |
| Kjarnukapitalprosent | 29,2 | 29,6 | 25,5 | 19,0 | 17,5 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | 9,3 | 8,7 | 10,6 | 10,6 | 9,4 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | 7,5 | 6,8 | 8,5 | 8,7 | 7,9 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,6 | 1,6 | 1,9 | 1,8 | 1,6 |
| Rentuváði | 1,6 | 1,0 | 1,8 | 1,7 | 0,5 |
| Gjaldoyrastøða | 0,2 | 0,1 | 0,2 | 0,1 | 0,2 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 99,5 | 107,6 | 92,9 | 111,5 | 108,1 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 158,6 | 106,9 | 156,8 | 27,6 | 66,6 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til eginpening | 43,1 | 17,6 | 35,9 | 68,6 | 52,4 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 0,1 | 0,4 | 0,0 | 0,1 | 0,6 |
| Burturleggingarprosent | 3,2 | 3,2 | 1,9 | 1,3 | 1,0 |
| Taps- og burturleggingarprosent í árinum | 0,5 | 0,3 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlánsvøkstur í árinum | 12,0 | 9,2 | 14,4 | 35,5 | 21,6 |
| Útlán í mun til eginpening | 3,7 | 3,7 | 3,9 | 4,9 | 5,4 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 57.464 | 58.197 | 60.155 | 68.290 | 83.221 |
| Virðisjavnan | -1.282 | -471 | -686 | 1.298 | -2.089 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 267 | -40 | 499 | 463 | 130 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 532 | 672 | 827 | 2.391 | 2.082 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **56.981** | **58.358** | **60.795** | **72.442** | **83.344** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 29.417 | 32.705 | 32.016 | 39.452 | 52.255 |
| Avskrivingar, ítøkilig ogn | 1.115 | 1.069 | 981 | 1.382 | 2.550 |
| Tap og burturleggingar, skuldarar | 4.654 | 2.684 | -858 | 208 | -1.939 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **21.795** | **21.900** | **28.656** | **31.400** | **30.478** |
| Skattur | 4.333 | 4.753 | 5.650 | 5.630 | 5.100 |
| **Ársúrslit** | **17.462** | **17.147** | **23.006** | **25.770** | **25.378** |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 888.997 | 970.605 | 1.110.576 | 1.504.597 | 1.828.888 |
| Virðisbrøv | 174.773 | 156.830 | 176.986 | 153.357 | 259.639 |
| Innlán | 924.263 | 932.098 | 1.219.133 | 1.368.755 | 1.710.053 |
| Javni | 1.177.590 | 1.202.537 | 1.513.846 | 1.759.747 | 2.253.280 |
| Eginpeningur | 242.426 | 259.576 | 282.647 | 309.526 | 337.037 |

# ÁRSFRÁGREIÐING

## Ársúrslitið

Úrslit sparikassans áðrenn skatt varð 30,5 mió.kr. í 2007, í mun til 31,4 mió.kr. í 2006. Ársúrslitið gjørdist 25,4 mió. kr. eftir skatt í mun til 25,8 mió.kr. í 2006.

## Inntøkur

Netto rentuinntøkurnar vóru 70,5 mió.kr. í 2007 í mun til 59,9 mió.kr. í 2006. Tað vil siga ein vøkstur í netto rentuinntøkunum uppá 10,6 mió.kr. í mun til árið fyri.

Henda øking kemur í høvuðsheitum frá, at útlán sparikassans hevur verið javnt høgt í 2007, meðan innlánsvøksturin í høvuðsheitum hevur verið í seinna hálvári 2007.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar eru øktar við 14,9 mió.kr., úr kr. 68,3 mió.kr. í 2006 til 83,2 mió.kr. í 2007. Ein vøkstur svarandi til 21,9%.

Virðisjavnan av lánsbrøvum og gjaldoyra vísti í 2007 eitt hall uppá 2,1 mió.kr. Í 2006 var eitt avlop uppá 1,3 mió.kr. Tað vil siga ein nettoávirkan uppá 3,4 mió. kr.

## Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. eru øktar við 12,8 mió. kr. í 2007 í mun til 2006. Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. vóru 52,1 mió.kr. í 2007 og 39,3 mió.kr. í 2006.
Henda øking av útreiðslum kemur í høvðusheitum frá, at sparikassin hevur økt sítt virksemi munandi. Í september 2006 læt sparikassin upp nýggja deild í Saltangará, og í apríl 2007 læt sparikassin upp nýggja deild í Tórshavn. Samstundis hevur verið arbeitt við at menna sparikassan enn meira.
Starvsfólkatalið er hækkað síðsta árið. Hetta hevur viðført ein vøkstur í lønarútreiðslum sparikassans, og eisini eru sáttmálabundnar lønir hækkaðar.

Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum vóru 2,6 mió.kr. í 2007, í mun til 1,4 mió. Kr. í 2006.

Aðrar vanligar útreiðslur vóru 0,1 mió.kr. í 2007, ið er tað sama sum í 2006.

Netto avskrivingar og burturleggingar høvdu eina inntøkuføring uppá 1,9 mió.kr. í 2007 í mun til eina útreiðsluføring uppá 0,2 mió.kr. í 2006.

## Gjaldføri og solvensur

Gjaldførið var 363 mió.kr við árslok 2007. Ein hækking uppá 150 mió. kr. í mun til í 2006. Orsøkin til hetta er at skuld til peningastovnar er økt við 127 mió. kr., og eisini at innlán sparikassans í 2007 hevur havt ein størri vøkstur enn

útlán sparikassans.

Gjaldførið var við árslok 47% av stuttfreistaðu skyldum sparikassans. Lógin krevur 15%.

Av samlaðu skyldum sparikassans var gjaldførið við árslok 17%. Lógin krevur her 10%.

Solvensur sparikassans fall við 1,5 %, frá 19,0 % við árslok 2006 til 17,5 % við árslok 2007. Lógin krevur 8 %.

## Fíggjarstøðan

Útlán sparikassans vóru við árslok 2007 1.829 mió.kr., og eru tey vaksin við 21,6%.

Innlánið er í sama tíðarskeiði økt við 24,9 % og er nú 1.710 mió.kr.

Skuld til peningastovnar er 190 mió.kr. við árslok 2007, í mun til 63 mió. kr. við árslok 2006. Hetta er ein vøkstur uppá 127 mió. kr.

Fíggjarstøða sparikassans vaks við 493 mió.kr. og javnvigar við 2.253 mió.kr. við árslok 2007. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 28 %.

Eginogn sparikassans er nú 337 mió.kr. Sparikassin hevði í 2007 eina renting av eginpeninginum áðrenn skatt uppá 9,4 %, í mun til eina renting av eginpeninginum áðrenn skatt uppá 10,6% í 2006.

## Býti av ársúrsliti

Nevndin skjýtur upp, at av ársúrslitinum uppá 25,4 mió.kr. saman við fluttum vinningi frá undanfarnum árum uppá 303,7 mió.kr. og gávugrunninum uppá 1 mió.kr., ella í alt 330,1 mió. kr, verða lagdar 1 mió.kr. í gávugrunnin og 329,1 mió. kr. verða fluttar til næsta ár.

## Starvsfólk

Starvsfólkatalið í sparikassanum var við árslok 46,8 umroknað til fulla tíð, ímóti 38,0 fólkum í 2006. Ein hækking upp á 8,8 ársverk.

## Framtíðin

Eftir at roknskapurin hjá Norðoya Sparikassa er avgreiddur, eru ikki hendar broytingar, ið eru av týdningi, tá metast skal um roknskaparúrslit og fíggjarligu støðu sparikassans.

Mett verður, at úrslitið í 2008 verður betri enn undanfarna ár.

# ÁTEKNINGAR TIL ÁRSFRÁSØGNINA

Nevnd og stjórn Norðoya Sparikassa hava í dag viðgjørt og góðtikið ársfrásøgnina fyri 2007, ið vit viðmæla aðalfundinum at góðkenna.

Klaksvík, hin 28. mars 2008

Stjórn

Eyðfinn Reyðberg

Nevnd

Óli Marnar Christiansen
*formaður*

Finn Kjølbro
*næstformaður*

Jógvan Joensen

Páll Klettskarð

Erling Petersen

Jóannes Hansen

Julianna Thomsen

Elmar Poulsen

# ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

## Til umboðsráðið í Norðoya Sparikassa

Vit hava grannskoðað ársfrásøgnina hjá Norðoya Sparikassa fyri roknskaparárið 1. januar til 31. desember 2007, við leiðsluátekning, ársfrágreiðing leiðslunar, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, uppgerð av eginogn, peningastreymsuppgerð og notum. Ársfrásøgnin er framd í samsvar við galdandi lóg um fíggjarvirksemi v.m., umframt kunngerðum og leiðreglum frá fíggjareftirlitinum fyri peningastovnar.

## Ábyrgd leiðslunar av ársfrásøgnini

Leiðslan hevur ábyrgd av uppsetan og framløgu av ársfrásøgnini, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við upplýsingarkrøv um fíggjarligar frásagnir. Henda ábyrgd umfatar at fyriskipa, íverkseta og viðlíkahalda innanhýsis eftirlit, ið er neyðugt, fyri uppsetan og framløgu av eini ársfrásøgn, ið vísir eina rættvísandi mynd uttan skeivleikar av týdningi, uttan mun til um feilir stava frá sviki ella mistøkum, ella  vali av nýtslu av roknskaparhátti ella roknskaparligum metingum, sum eftir umstøðum verða mett at vera hóskandi.

## Ábyrgd grannskoðarans og framda grannskoðanin

Okkara ábyrgd er at orða eina niðurstøðu um ársfrásøgnina, við støði í okkara grannskoðan. Vit hava útint grannskoðan okkara í samsvar við vanligar grannskoðarareglur. Hesar reglur krevja, at vit halda etisku krøvini, umframt at vit tilrættaleggja og fremja grannskoðanina við atliti til at fáa eina grundaða vissu fyri, at ársfrásøgnin ikki inniheldur skeivleikar av týdningi.

Grannskoðanin umfatar tað arbeiði ið er neyðugt, til tess at prógv kann fáast um tær upphæddir og upplýsingar, ið nevnd eru í ársfrásøgnini. Grannskoðanin metir um hvat arbeiði er neyðugt at gera, herundir meting av váða fyri skeivum upplýsingum av týdningi í ársfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikar stava frá sviki ella mistøkum. Í samband við váðameting metir grannskoðanin um innanhýsis eftirlitið, ið er neyðugt í samband við uppsetan og framløgu av eini ársfrásøgn, ið vísir eina rætta mynd, við atliti til at fremja grannskoðaratiltøk, ið er hóskandi eftir umstøðunum, men ikki við tí fyri eyga, at meta um hvussu munadygt innanhýsis eftirlitið er. Ein grannskoðan umfatar harumframt støðutakan til, um nýtti roknskaparháttur leiðslunar er hóskandi, um roknskaparligu metingar leiðslunar eru hóskandi, umframt ein heildarmetan av framløgdu ársfrásøgnini.

Tað er okkara fatan, at tey grannskoðaraprógv vit hava fingið eru nøktandi og hóskandi sum grundarlag fyri niðurstøðu okkara.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu sparikassans pr. 31. desember 2007, umframt úrsliti av virksemi og peningastreymi sparikassans fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2007, í samsvari við upplýsingarkrøvini fyri fíggjarligar frásagnir.

Nykøbing Mors, tann 28. mars 2008
BDO ScanRevision
Statsautoriseret revisionsaktieselskab

Klaksvík, tann 28. mars 2008

Jens Peter Egebjerg Hansen
*Statsautoriseret revisor*

Símun Absalonsen
*løggildur grannskoðari*

# RAKSTRARROKNSKAPUR

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur o.a. | 126.956 | 85.357 |
| 2 | Rentuútreiðslur o.a. | 56.451 | 25.437 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **70.505** | **59.920** |
| | | | |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 2.532 | 377 |
| | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 11.110 | 8.887 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 926 | 894 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **83.221** | **68.290** |
| | | | |
| 3 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | -2.089 | 1.298 |
| 4 | Aðrar vanligar inntøkur | 2.082 | 2.391 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 52.142 | 39.349 |
| 6 | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 2.550 | 1.382 |
| 7 | Aðrar vanligar útreiðslur | 113 | 103 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | -1.939 | 208 |
| | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | 130 | 463 |
| | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **30.478** | **31.400** |
| | | | |
| 23 | Skattur | 5.100 | 5.630 |
| | **Ársúrslit** | **25.378** | **25.770** |
| | | | |
| | **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| | Ársúrslit | 25.378 | 25.770 |
| | Flutt úr gávugrunni | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 303.747 | 277.977 |
| | **Til taks tilsamans** | **330.125** | **304.747** |
| | | | |
| | Lagt í gávugrunn | 1.000 | 1.000 |
| | At flyta til næsta ár | 329.125 | 303.747 |
| | **Tilsamans nýtt av peningi, ið er til taks** | **330.125** | **304.747** |

# FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | |
| | Kassapeningur og innistandandi | | |
| | uttan uppsøgn í tjóðbankum | 27.060 | 34.705 |
| 8 | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 79.321 | 30.533 |
| 9 | Útlán | 1.828.888 | 1.504.597 |
| 10 | Lánsbrøv | 194.685 | 95.897 |
| 11 | Partabrøv o.a. | 64.954 | 57.460 |
| 11 | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 0 | 0 |
| 11 | Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 12.078 | 11.448 |
| 12 | Ítøkiligar ognir | 36.468 | 20.854 |
| 13 | Aðrar ognir | 9.826 | 4.253 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.253.280** | **1.759.747** |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | **Skuld** | | |
| 14 | Skuld til peningastovnar | 190.000 | 63.000 |
| 15 | Innlán | 1.710.053 | 1.368.755 |
| | Onnur skuld | 13.224 | 15.631 |
| 16 | Burturleggingar til útreiðslur | 2.966 | 2.835 |
| | **Skuld tilsamans** | **1.916.243** | **1.450.221** |
| | | | |
| | **Eginpeningur** | | |
| 17 | Ábyrgdarpeningur | 6.912 | 4.779 |
| | Gávugrunnur | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 303.747 | 277.977 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 25.378 | 25.770 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **337.037** | **309.526** |
| | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.253.280** | **1.759.747** |
| | | | |
| 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| | Ábyrgdir o.a. | 266.338 | 216.465 |
| | Aðrar ábyrgdir | 14.782 | 14.484 |
| | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **281.120** | **230.949** |

# KAPITALFLYTINGAR OG SOLVENSUPPGERÐ

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Kapitalflytingar** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 4.779 | 3.669 |
| | Tilgongd í árinum | 2.286 | 1.154 |
| | Frágongd í árinum | 153 | 44 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **6.912** | **4.779** |
| | | | |
| | Gávugrunnur við ársbyrjan | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt til yvirskotsbýti | 1.000 | 1.000 |
| | Flutt frá býti av ársvinningi | 1.000 | 1.000 |
| | **Gávugrunnur við ársenda** | **1.000** | **1.000** |
| | | | |
| | Flutt avlop við ársbyrjan | 303.747 | 277.977 |
| | Flutt frá gávugrunni, netto | 0 | 0 |
| | Flutt frá ársúrsliti | 25.378 | 25.770 |
| | **Flutt avlop við ársenda** | **329.125** | **303.747** |
| | | | |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **337.037** | **309.526** |
| | | | |
| | **Solvensuppgerð** | | |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg | 337.037 | 309.526 |
| | Ábyrgdarkapitalur aftaná frádrøg | 337.037 | 309.526 |
| | Vektaðar ognir, ikki íroknaðar handilsgoymslu | 1.649.025 | 1.364.558 |
| | Vektaði tøl undir strikuni | 257.129 | 206.965 |
| | Vektaði tøl við marknaðarváða | 24.932 | 53.976 |
| | **Vektað tøl tilsamans** | **1.931.086** | **1.625.499** |
| | | | |
| | Solvensprosent sambært BSL §21, stk. 1 | 17,5% | 19,0% |
| | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg í prosentum av vektaðum tølum tilsamans | 17,5% | 19,0% |

# PENINGASTREYMSROKNSKAPUR

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| | **Rakstur** | | |
| | Ársúrslit eftir skatt | 25.378 | 25.770 |
| | | | |
| | Broytingar viðv. upphæddum uttan gjaldførisárin: | | |
| | Útsettur skattur | 187 | 141 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 2.550 | 1.382 |
| | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | -1.939 | 208 |
| | Burturleggingar til útreiðslur | -56 | -47 |
| | **Íalt frá rakstri** | **26.120** | **27.453** |
| | | | |
| | **Rakstrarkapitalur** | | |
| | Útlán | -322.352 | -394.228 |
| | Innlán | 341.298 | 149.622 |
| | Skuld til peningastovnar | 127.000 | 63.000 |
| | Aðrar ognir | -5.573 | -180 |
| | Onnur skuld | -2.407 | 6.305 |
| | **Tilsamans frá rakstrarkapitali** | **137.966** | **-175.481** |
| | | | |
| | **Íløgur** | | |
| | Lánsbrøv | -98.788 | 60.053 |
| | Partabrøv | -7.494 | -36.424 |
| | Kapitalpartar | -630 | -463 |
| | Ítøkiligar ognir | -18.164 | -11.656 |
| | **Tilsamans frá íløgum** | **-125.076** | **11.510** |
| | | | |
| | **Fígging** | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 2.133 | 1.110 |
| | | | |
| | Broytingar í gjaldføri | 41.143 | -135.408 |
| | Gjaldføri við ársbyrjan | 65.238 | 200.646 |
| | **Gjaldføri við ársenda** | **106.381** | **65.238** |

# VIÐMERKINGAR

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 | **Rentuinntøkur o.a.** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 3.565 | 1.797 |
| | Útlán | 119.435 | 78.964 |
| | Lánsbrøv | 3.956 | 4.596 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **126.956** | **85.357** |
| | | | |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistanandi hjá peningastovnum | 7.737 | 177 |
| | Innlán | 48.433 | 25.112 |
| | Ábyrgdarpeningur | 281 | 148 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **56.451** | **25.437** |
| | | | |
| 3 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | 1.192 | -1.148 |
| | Partabrøv | -3.299 | 1.648 |
| | Gjaldoyra | 18 | 798 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **-2.089** | **1.298** |
| | | | |
| 4 | **Aðrar vanligar inntøkur** | | |
| | Nettoúrslit av rakstri av fastari ogn | 416 | 424 |
| | Aðrar vanligar inntøkur | 1.666 | 1.967 |
| | **Aðrar vanligar inntøkur tilsamans** | **2.082** | **2.391** |
| | | | |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a.** | | |
| | Løn og samsýning til nevnd | 600 | 550 |
| | Løn, eftirløn og samsýning til stjórn | 2.097 | 1.882 |
| | Løn og samsýning til umboðsráð | 133 | 116 |
| | Løn til starvsfólk | 17.075 | 12.460 |
| | Eftirløn til starvsfólk | 2.483 | 2.037 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd o.a. | 1.569 | 1.229 |
| | **Starvsfólkaútreiðslur tilsamans** | **23.957** | **18.274** |
| | | | |
| | Aðrar umsitingarútreiðslur | 28.185 | 21.075 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. tilsamans** | **52.142** | **39.349** |

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 5 | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk (framhald) | 46,8 | 38,0 |
| | **Útreiðslur til grannskoðarar** | **642** | **466** |
| | Harav annað arbeiði enn grannskoðan | 0 | 0 |
| | | | |
| 6 | **Av- og niður-skrivingar av ítøkiligum ognum** | | |
| | Bygningar | 623 | 223 |
| | Maskinur og innbúgv | 1.927 | 1.159 |
| | **Av- og niður-skrivingar av ítøkiligum ognum tilsamans** | **2.550** | **1.382** |
| | | | |
| 7 | **Aðrar vanligar útreiðslur** | | |
| | Útgoldið úr gávugrunninum | 113 | 103 |
| | Aðrar vanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| | **Aðrar vanligar útreiðslur tilsamans** | **113** | **103** |
| | | | |
| 8 | **Ogn hjá peningastovnum o.ø.** | | |
| | Uttan uppsøgn | 59.338 | 20.533 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 19.983 | 10.000 |
| | **Ogn hjá peningastovnum o.ø. tilsamans** | **79.321** | **30.533** |
| | | | |
| 9 | **Útlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 48.792 | 37.476 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 29.723 | 39.413 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 113.562 | 112.530 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 433.581 | 372.302 |
| | Yvir 5 ár | 1.203.230 | 942.876 |
| | **Útlán tilsamans** | **1.828.888** | **1.504.597** |
| | | | |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar** | | |
| | Burturlagt uppá útlán og ábyrgdir við ársenda | 20.218 | 23.102 |
| | Burturlagt við ársenda uppá ogn hjá peningastovnum og aðrar postar við kredittváða | 0 | 0 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar tilsamans** | **20.218** | **23.102** |

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 9 | **Akkumuleraðar burturleggingar í % av** | | |
| | **bruttoútlánum og ábyrgdum við ársenda (framhald)** | **1,0%** | **1,3%** |
| | **Ikki renturoknað áogn við ársenda** | **12.219** | **1.156** |
| | | | |
| 10 | **Lánsbrøv** | | |
| | Skrásett á keypsskálum | 194.685 | 95.897 |
| | | | |
| 11 | **Partabrøv** | | |
| | Skrásett á keypsskálum | 39.838 | 36.610 |
| | Onnur | 25.116 | 20.850 |
| | | | |
| | **Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum** | | |
| | Onnur | 0 | 0 |
| | | | |
| | **Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum** | | |
| | Bókað virði primo | 11.448 | 10.985 |
| | Tilgongd | 500 | 0 |
| | Úrslit av kapitalpartum | 130 | 463 |
| | **Bókað virði ultimo** | **12.078** | **11.448** |

**Konsernuppgerð**

Konsernin umfatar Norðoya Sparikassa og Sp/f Heim

| | *Móðurfelag* | *Sp/f Heim* | *Konsern* |
|---|---|---|---|
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 83.221 | 0 | 83.221 |
| Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt | 30.478 | 130 | 30.478 |
| Ársúrslit | 25.378 | 130 | 25.378 |
| Ogn tilsamans | 2.253.280 | 42.939 | 2.253.280 |
| Eginpeningur | 337.037 | 11.578 | 337.037 |

| | | 2007 | 2006 |
|---|---|---|---|
| | **Fíggjarlig umsetningsogn** | | |
| | Fíggjarlig umsetningsogn ásett til marknaðarvirði | 234.523 | 132.506 |
| | Munur millum útveganarvirði av fíggjarligari umsetningsogn omanfyri og hægra marknaðarvirði uppgerðardagin | -6.452 | 1.723 |
| | | | |
| 12 | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Fastar ognir** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 11.468 | 11.468 |
| | Tilgongd | 6.090 | 0 |
| | Frágongd | 0 | 0 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **17.558** | **11.468** |

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 12 | Avskrivingar við ársbyrjan (framhald) | 4.144 | 3.921 |
| | Av- og niðurskrivingar í árinum | 623 | 223 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 0 | 0 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **4.767** | **4.144** |
| | | | |
| | **Bókað virði við ársenda** | **12.791** | **7.324** |
| | | | |
| | **Ítøkiligar ognir** | | |
| | **Maskinur, innbúgv o.a.** | | |
| | Keypsvirði við ársbyrjan | 23.503 | 11.866 |
| | Tilgongd | 12.074 | 11.733 |
| | Frágongd | 0 | 96 |
| | **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **35.577** | **23.503** |
| | | | |
| | Avskrivingar við ársbyrjan | 9.973 | 8.833 |
| | Avskrivingar í árinum | 1.927 | 1.159 |
| | Afturfluttar av- og niðurskrivingar | 0 | 19 |
| | **Avskrivingar við ársenda** | **11.900** | **9.973** |
| | | | |
| | **Bókað virði við ársenda** | **23.677** | **13.530** |
| | | | |
| | **Bókað virði við ársenda, ítøkiligar ognir tilsamans** | **36.468** | **20.854** |
| | | | |
| 13 | **Aðrar ognir** | | |
| | Roknaðar rentur tilgóðar | 6.083 | 1.708 |
| | Aðrar ognir | 3.743 | 2.545 |
| | **Aðrar ognir tilsamans** | **9.826** | **4.253** |
| | | | |
| 14 | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar** | | |
| | Uttan uppsøgn | 0 | 0 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 100.000 | 63.000 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 25.000 | 0 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 45.000 | 0 |
| | Yvir 5 ár | 20.000 | 0 |
| | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar tilsamans** | **190.000** | **63.000** |
| | | | |
| 15 | **Innlán** | | |
| | Uttan uppsøgn | 590.132 | 574.215 |
| | Við uppsøgn | 873.127 | 510.304 |
| | Tíðarinnskot | 137.164 | 186.389 |
| | Serinnlán | 109.630 | 97.847 |
| | **Innlán tilsamans** | **1.710.053** | **1.368.755** |

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 15 | Uttan uppsøgn (framhald) | 590.132 | 574.215 |
| | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 275.036 | 114.822 |
| | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 764.637 | 606.132 |
| | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 15.690 | 16.607 |
| | Yvir 5 ár | 64.558 | 56.979 |
| | **Innlán tilsamans** | **1.710.053** | **1.368.755** |
| | | | |
| 16 | **Burturleggingar til útreiðslur** | | |
| | Treytaleys eftirlønartilsøgn | 2.543 | 2.599 |
| | Útsettur skattur | 423 | 236 |
| | **Burturleggingar til útreiðslur tilsamans** | **2.966** | **2.835** |
| | | | |
| 17 | **Ábyrgdarpeningur** | | |
| | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 4.779 | 3.669 |
| | Tilgongd, netto | 2.133 | 1.110 |
| | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **6.912** | **4.779** |
| | | | |
| 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| | Aðrar ábyrgdir | 266.338 | 216.465 |
| | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 14.782 | 14.484 |
| | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **281.120** | **230.949** |
| | | | |
| 19 | **Stjórn og nevnd** | | |
| | Lán, veðhald, borgsskyldur ella ábyrgdir og trygdir, stovnað fyri stjórn og nevnd sparikassans | | |
| | Stjórn | 2.857 | 1.823 |
| | Nevnd | 2.740 | 2.652 |
| | | | |
| | Tilhoyrandi trygdir | | |
| | Stjórn | 2.890 | 3.090 |
| | Nevnd | 4.929 | 4.655 |
| | | | |
| 20 | **Kredittváðar- útlán býtt í vinnugreinir í %** | | |
| | Almennir myndugleikar | 0 | 1 |
| | | | |
| | **Vinnur** | | |
| | Fiskivinna | 5 | 7 |
| | Framleiðsluvinna o.a. | 5 | 5 |
| | Byggivinna | 4 | 4 |

| Viðm. | | 2007<br>1.000 DKK | 2006<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 20 | Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna (framhald) | 11 | 10 |
| | Flutningur, postur og telefon | 2 | 3 |
| | Kreditt-, fíggingar- og tryggingarvinna | 0 | 0 |
| | Handil og umsiting av fastari ogn | 12 | 12 |
| | Aðrar vinnur | 3 | 2 |
| | **Vinnur tilsamans** | **42** | **43** |
| | Privat | 58 | 56 |
| | **Tilsamans** | **100** | **100** |
| | | | |
| 21 | **Marknaðarváðar** | | |
| | Gjaldoyraváði | | |
| | Ogn í fremmandum gjaldoyra | 906 | 1.524 |
| | Skuld í fremmandum gjaldoyra | 303 | 1.212 |
| | Gjaldoyraábending | 603 | 312 |
| | Gjaldoyraábending í % av kjarnukapitali aftaná frádráttir | 0,2 | 0,1 |
| | | | |
| 22 | **Rentuváðar** | | |
| | Rentuváði av fíggjartólum | | |
| | alt í DKK | 1.553 | 5.175 |
| | | | |
| 23 | **Skattur** | | |
| | Roknaður skattur av ársvinningi | 4.913 | 5.489 |
| | Útsettur skattur | 187 | 141 |
| | Javnan av roknaðum skatti | 0 | 0 |
| | **Tilsamans** | **5.100** | **5.630** |
| | | | |
| | Roknaður skattur | 18,00% | 18,00% |
| | Støðugt frávik – inntøkur og útreiðslur, ið ikki eru skattskyldugar | -1,26% | -0,52% |
| | Útsettur skattur | -0,01% | 0,45% |
| | Javnan av roknaðum skatti | 0,00% | 0,00% |
| | **Effektivt skattaprosent** | **16,73%** | **17,93%** |
| | | | |
| 24 | **Millumverandi við tilknýttar fyritøkur, ið ikki eru konsolideraðar** | | |
| | Sp/f Heim | 100% | 100% |
| | P/f Fastognarfelagið Ósávegur 1 | 100% | - |
| | | | |
| | **Innlán** | **4.319** | **14.469** |
| | | | |
| | **Útlán** | **0** | **0** |

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

## Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri 2007 hjá Norðoya Sparikassa er gjørdur í samsvari við lóg um bankar og sparikassar o.a. umframt kunngerð frá Fíggjareftirlitinum um framløgu av roknskapi hjá peningastovnum.

Nýtti roknskaparhátturin er tann sami, sum varð nýttur í 2006. Samanlíkningartølini fyri 2006 og 2007 eru uppgjørd eftir somu roknskaparkunngerð.

## Tíðaravmarkingar

Rentuinntøkur o.a. og rentuútreiðslur o.a. eru fult út tíðaravmarkaðar, eins og allar aðrar avgerandi inntøkur og útreiðslur eru tíðaravmarkaðar.

## Konsernroknskapur

Norðoya Sparikassi hevur tvey dótturfeløg: Sp/f Heim og P/f Fastognarfelagið Ósávegur 1.

Felagið, Sp/f Heim, eigur eina fasta ogn sum verður útleigað, harumframt ger felagið kapitalíløgur. Konsernroknskapur er ikki gjørdur, grunda á at hetta virksemið ikki er ein týðandi partur av tí samlaða konsern-virkseminum.

Felagið, P/f Fastognarfelagið Ósávegur 1, varð stovnað í 2007, men hevur onki virksemi havt í árinum.

## Kassapeningur, innlán uttan uppsøgn hjá tjóðbankum og ogn hjá peningastovnum

Hesar ognir eru tiknar við til áljóðandi virði.

## Útlán og onnur áogn

Sparikassans samlaðu ognir eru í samsvar við góðan og varnan roknskaparhátt undirgivnar eina atfinningarsama meting við atliti til avhyljing av tapsvandum, og tær neyðugu upphæddirnar eru avsettar. Staðfest tap ígjøgnum árið eru avskrivað fult út.

## Lánsbrøv, partabrøv og kapitalpartar

Goymsla sparikassans av keypsskálaskrásettum lánsbrøvum og partabrøvum er sett til teir almennu kursirnar við ársenda 2007.

Goymsla sparikassans av partabrøvum, ið eru óskrásett, er í mesta lagi sett til keypsvirðið.

Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum, ið eru óskrásett partabrøv, eru tiknir upp til innara roknskaparliga virðið við ársenda 2007.

## Fastar ognir

Fastar ognir eru virðissettar til keypsvirðið við ískoyti av ábøtum og við frádrátti av avskrivingum.
Ognir, sum sparikassin hevur ognað sær til egna nýtslu, verða avskrivaðar yvir 50 ár, meðan ognir, ið sparikassin hevur yvirtikið í samband við uppgerð av millumverandi, og sum skulu seljast, verða avskrivaðar við støði í árligum innanhýsis metingum av ognunum.

## Maskinur og innbúgv

Maskinur og innbúgv eru sett til keypsvirðið frádrigið avskrivingar. Avskrivað verður rættlinjað í tíðarskeiðinum, ognirnar kunnu hugsast vera haldgóðar.

## Fremmant gjaldoyra

Goymslan í fremmandum gjaldoyra er sett til skrásettu kursirnar við ársenda.

## Innlán og onnur skuld

Innlán og onnur skuld eru upptikin til áljóðandi virði.

## Skattur

Skattur av ársinntøkuni og broytingar í útsettum skatti er útreiðsluført.

www.ns.fo